# lendsk nøvn




## Ampop

[myspace.com/ampopband]

Íslendski elektroniski bólkurin Ampop gav í november fjórðu fløgu sína fløguna "Sail to the Moon" út. Fløgan varð av lurtarum á størstu íslendsku útvarpsstøðini Rás 2 vald til ársins fløgu, eins og hon er í uppskoti til fleiri heiðurslønir á íslendsku tónleikaheiðurslønunum.

Næst seinasta fløgan hjá Ampop "My Delusions" seldi til gullfløgu í Íslandi og tittullagið varð valt til ársins lag og ársins sjónbandalag á íslendsku tónleikaheiðurslønunum í fjør.

Ampop byrjaði sum ein elektronisk duo og gav í hesum líki tvær fløgur út, ið ummælarar og smalir lurtararskarðar vóru sera begtiknir av. Bólkurin broyttist nakað, tá trummuleikarin kom við í bólkin og ljóðið flutti seg til meira trummu og gittarbasera. Samstundis fekk bólkurin veruliga luft undir veingirnar og fór veruliga at gera um seg í útvarpi og á hittlistunum.



## Grand Island

[myspace.com/thegrandisland]

Gand Island úr Noregi spælir eitt slag av nýrokki, ið teir sjálvir lýsa á henda forvitnisliga hátt:

"...ein tættsitandi kókandi eind. Ein skitin samanrenning av soul, bluegrass, disco, hardcore og rock n'roll.

Svávulbrendar røddir, tung orgul ljóð, banjo fingraspæl frá 1976, oyðimarkar bassur og stórbýar trummuspæl. Hetter er veruliga ein fagnaður av kompremiðleysum ljóðbylgjum í yvirflóð."

Stuttligur tónleikur við stórari spæligleiði. Hetta er ringt at lýsa, men lætt at lurta eftir, so tí er bert at vitja bólkin HYPERLINK "http://www.myspace.com/thegrandisland" á myspace síðuni ella á grandisland.no, tí har liggja smakksroyndir av teirra tónleiki.



## Molinder Band

[myspace.com/molinderband]

Molinder Band er svenskur bólkur við oddamanninum Jonas Molinder. Í veruleikanum er mest av øllum talan um eina einstaklinga verkætlan, ið hevur givið 3 EP fløgur út: Soul in me (2001), Life Spark (2003) og Kill Your Darlings (2004). Nøkur ár eru fráliðin síðan síðstu útgávu, hetta kemst m.a. av, at Jonas Molinder, helt steðg frá tónleiki í eitt ár. Hann brúkti tíðina at leita eftir nýggjum íblástri. Við endurfunnari spæligleði stovnaði hann egið plátufelag, Tender Records. Eitt plátufelag har Jonas sjálvur stýrir síni tónlistarligu yrkisleið. Í apríl kemur fløgan In The Room With Fire, útgivin á nýggja felagnum. Tað verður sostatt ein plátuaktuellur bólkur, ið vitjar á AME. Tóleikurin hjá Jonas Molinder finnur íblástur í tí tónleiki, ið hann lurtaði eftir sum yngri, nøvnum sum Stevie Wonder, Sting, Louise Hoffsten og Phil Collins.